# - Sjáldsama ró




*- Eg haldi, at øll vóru eitt sindur kedd um at tey ikki slupp avstaðaftur beinanvegin, sigur Símun Pauli Viðbjørg, sum er mjølteknikari umborð á Navigator*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**- Nei, her var ongatíð nakað tekin til panikk umborð.**
**- Ja, eg vil faktiskt siga tað so, at her var sjáldsama róligt umborð, sigur ein av manningini, Símun Pauli Viðbjørg í samrøðu við Sosialin.**

Á LAND
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*

**Klaksvík:** Eingin panikkur var umborð á Atlantic Navigator, tá hesin stóri trolarin rendi á Kunoyarnes nakað fyri klokkan 10 í gjárkvøldið.

Nakrar tímar seinni kom trolarin tó av aftur klettinum, har hann hevði staðið, og fekst síðani at landi í Ánunum, nakrað seinni enn ætlað.

Enn er ógreitt um nakar skaði er komin á botnin, men roknað verður kortini ikki við stórum skaða. Fyri at tryggja seg fult og heilt var froskmaður frá Atlantic Diving niðri og kannaði botnin, bæði har frammi og harafturi fyrrapartin.

Hetta varð gjørt við upptøkutóli, har menn, m.a. frá Norsk Veritas og sjódeildini hjá Tryggingarfelagnum Føroyar í landi kundu fylgja við á skíggja, hvussu arbeiðið at kanna botnin og møguligar skaðar gekk hjá froskmanninum.

Samstundis við hetta vóru fólk frá Skipaeftirlitinum á brúnni, har skiparin skuldi greiða frá tí, sum hendi kvøldið fyri.

> *Tað var eitt sindur undarligt at standa soleiðis uppi á landi, - so tætt, at ein nærum kundi havt lopið í land*

Sum skilst á monnum í Klaksvík er ein møgulig orsøk til óhappið í stuttum hon, at umstýringin sveik umborð.

### Fullfermt

Skipið var at kalla fullfermt av surimi og fiskamjøli - eini 1900 tons - nú ætlanin var at leggja veiðuna upp í Ánunum í gjárkvøldið.

Ætlanin var síðani at fara nýggjan túr í morgin.

Hetta verður nú av ongum, tí øll viðurskifti í samband við óhappið skulu kannast fyrst.

- Eg haldi, at fólk vóru eitt sindur kedd, tí tey ikki sluppu aftur á nýggjan túr beinanvegin.

- Men tað sær ikki so ógvusligt út kortini. Kanska verður ikki so leingi, til vit leggja frá landi aftur, sigur Símun Pauli Viðbjørg.

Sum skilst skuldi manningin mynstra umborð á middegi í morgin. Men er hetta útsett av góðum grundum.

### Eftir skráningi

Upprunaliga var ætlanin, at Navigator skuldi koma at landi í Ánunum um 10-tíðina í gjárkvøldið.

Túrurin hesaferð var stuttur, men royndist hóast tað avbera góður hjá skipi og manning. Inntil í gjárkvøldið.

Sjálvur stóð Símun Pauli eina hædd longur niðri enn brúgvin, tá skipið fór á land undir Kunoyarnesi.

- Eg veit ikki, men eg merkti ótrúliga lítið til tað. Bara eini 2-3 smá rykk, men har var eingin harðligur brestur.

- Tað virkaði sum hann bara fór heilt spakuliga upp eftir einum skráningi, greiðir hann frá.

At tað ikki var so ógvusligt, sum tað kann tykjast, gjørdi helst sítt til at øll manningin var so rólig - og at alt fór fram uttan stórvegis dramatikk.

### Leypa í land

Sjálvur heldur Símun Pauli manningina at hava verið